**Ársfrásøgn og roknskapargreining**

**Lær at lesa og at skilja ein roknskap**

Lærugreinin "Ársfrásøgn og roknskapargreining" gevur tær førleikar at lesa, greina og skilja ársfrásøgnina hjá einari fyritøku, og samstundis fært tú skil fyri sambandinum, sum er ímillum búskaparstýringina innanhýsis á fyritøkuni og ta lógarásettu ársfrásøgnina.

Tú fert at fáa kunnleika til tær mest týðandi lógirnar, herímillum ársroknskaparlógina og bókhaldslógina.

**Innihald**

- Grundsúlurnar í roknskaparlógarverkinum, tvs. bókhaldslógin, ársroknskaparlógin og bygnaðurin (roknskaparbólkarnir)
- Endamál og innihald av einari roknskapargreining
- Ársfrásøgnin – innihald og endamál
- Rakstrarroknskapir mótvegis skattaroknskapum - og øðrum roknskaparformum
- Váðastýring
- Virðisásetan av fyritøkum

Lærugreinin telur 10 ECTS og endar við einari 4 tímar langari skrivligari próvtøku.

Lærugreinin ársfrásøgn og roknskapargreining kann takast sum stakprógv; hon kann eisini innganga sum ein vallærugrein í einum samlaðum akademiprógvi.